INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

FKF jour nr 09-133_1

**Til hoyringspartarnar**

17. januar 2011

Mál: 11/00019-5

Tygara skriv:
Málsviðgerð: AH

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 44 verður orðað soleiðis:
"**§ 44.** Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við bót, sum
1) brýtur § 7, stk. 1, § 8, stk. 1, § 13, stk. 1, § 14, stk. 1 og 2, § 17, § 21, stk. 1 og § 25, stk. 1
2) setur treytir sambært § 18, stk. 2 og § 25, stk. 2 til viks,
3) ikki letur inn fráboðan sambært § 26, stk. 1-2, ella upplýsingar sambært § 26, stk. 3,
4) ikki fylgir banni ella boðum sambært § 31, stk. 1-2, ella banni sambært § 32, stk. 1 og 2,
5) forðar kanningum sambært § 30, stk. 1 og 2, ella eftirliti sambært § 34, stk. 1 og 2, ella
6) forðar fyri, at skip verður hildið aftur sambært § 33, stk. 2.
*Stk. 2.* Ásetan av bót fyri brot á § 7, stk. 1 og 2 skal hava støði í tí nøgd av olju, ið er burturbeind.
*Stk. 3.* Revsingin kann hækka til fongsul í upp til 2 ár, um brotið er framt við vilja ella við grovum ósketni, og um tað við brotinum er
1) voldur skaði á umhvørvið, ella elvt er til vanda fyri slíkum skaða, ella
2) peningaligur fyrimunur er fingin, ella tílíkur fyrimunur hevur verið tilætlaður fyri viðkomandi sjálvan ella onnur, eitt nú við sparingum.
*Stk. 4.* Reglurnar í stk. 3 eru ikki galdandi fyri brot, framd av útlendskum skipum. Fyri brot, framd av útlendskum skipum, kann revsingin hækka til fongsul í 2 ár, um brotið er framt á sjóumveldinum, og dálkingin er álvarsom og framd við vilja."

**2)** § 46, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Stk. 1 verður samsvarandi nýtt í málum um brot á fráboðanarskylduna sambært § 26 og í málum um brot á reglur, ásettar sambært § 19 viðvíkjandi burturbeining av olju frá havstøðum."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Lógarbroytingin verður gjørd fyri at røkka mál samgongunnar um at hækka revsingina fyri brot á umhvørvislóggávuna og fyri at heimila fyrisitingarliga avgreiðslu av staðfestum lógarbrotum á fráboðanarskylduna í lógini um verju av havumhvørvinum.

Lógaruppskotið inniheldur tvinnar broytingar:
Onnur broytingin snýr seg um at hækka revsingina fyri oljudálking, meðan hin snýr seg um at heimila fyrisitingini at avgreiða mál um brot á lógásettu fráboðanarskylduna við sektaruppskoti, eins og gjørt verður í málum um brot á § 7 fyri ólógliga burturbeining av olju sambært § 44 í lógini.

Nú lógin um verju av havumhvørvinum hevur gott og væl fimm ár á baki, eru fleiri revsimál avgreidd um brot á § 7 í lógini fyri ólógliga oljudálking.

Í verandi lóg um verju av havumhvørvinum er tað í serligu viðmerkingunum til revsiásetingina í § 44 ásettar vegleiðandi bótaupphæddir fyri oljudálking á sjónum. Hesar upphæddir hava verið nýttar sum grundarlag undir ásetan av revsing fyri brot á § 7 um oljudálking, bæði í førum har lógarbrot eru avgreidd sum fyrisitingarlig sektaruppskot og í førum har lógarbrot eru avgreidd sum rættarmál hjá dómsvaldinum.

Broytingin um at hækka revsingina fyri oljudálking er einans sjónlig í serligu viðmerkingunum í lógaruppskotinum. Orsøkin er, at vegleiðandi bótaupphæddirnar í verandi lóg frá 2005 eru ásettar í viðmerkingunum og ikki í lógartekstinum. Mett verður framhaldandi, at tað lógartøkniliga ikki hóskar seg at áseta vegleiðandi bótastøddir í sjálvan lógartekstin, eitt nú tí at málsføru myndugleikarnir mugu hava rásarrúm til at meta um, hvørt tað í tí einstaka málinum eru linnandi ella herðandi umstøður, hvørs avleiðing eigur at verða, at bótastøddin antin skal minka ella vaksa samsvarandi ítøkiligu umstøðunum.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Mett verður, at ein hækkan av bótastøddunum sum revsing fyri ólógliga burturbeining av olju fer at hava størri fyribyrgjandi virknað enn lægru bótastøddirnar, sum higartil hava verið galdandi.

Skiparar, maskinstjórar, reiðarar o.o. fara vónandi at ansa betur eftir, at olja ikki rennur á sjógv vegna mistøk, vantandi viðlíkahald ella av øðrum orsøkum, tí fíggjarligu revsiavleiðingarnar verða størri enn áður, óansæð um skipið ella báturin hevur føroyskt ella útlendskt flagg.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær sosialar avleiðingar. Mett verður, at uppskotið hevur við sær positivar avleiðingar fyri umhvørvið, við tað at herda bótarevsingin fer at hækka um eftiransni, so færri og minni oljudálkingar koma fyri í framtíðini. Ongar avleiðingar eru í mun til altjóða avtalur. Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri kommunalar

myndugleikar ella ávís øki í landinum. Uppskotið hevur ikki algongdar fíggjarliga avleiðingar fyri vinnuna sum heild, eftirsum talan bert er um at herða revsingina fyri ólógliga oljudálking.

| | Landsmynd-ugleikar | Kommunalar myndugleikar | Pláss/øki í landinum | Ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar Avleiðingar | | | | Nei | |

**Hoyring og løglig eftirkanning**

Uppskotið hevur verið í hoyring hjá hoyringspørtunum, sum eru: Strandfaraskip landsins, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag, Maskinmeistarafelagið, Føroya Skipara- og navigatørfelag, Tórshavnar bátafelag, Magn, Effo, OSR Faroes, Faroe Ship, Samskip, Føroya kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Fiskimálaráðið, Skipaeftirlitið, Fiskiveiðieftirlitið, MRCC Tórshavn, Vinnumálaráðið, Jarðfeingi, Atlantsflog, Fíggjarmálaráðið, Føroya landfúti, Føroya Náttúrugripasavn, Heilsufrøðiliga starvsstovan, Umhvørvisstovan og Landsverk.

Lógaruppskotið er løgliga eftirkannað av løgdeildini í Innlendismálaráðnum, áðrenn tað er sent Løgtingsskrivstovuni.

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1**
Skotið verður upp at herða revsingina fyri ólógliga oljudálking á sjónum. Sambært § 7 í lógini er eitt og hvørt útlát, frárensl, útblaking ella onnur burturbeining í havið av olju bannað. Einasta undantak er ásett í § 39 í lógini, tá skip og bátar koma í force majeure har tvingandi umstøður eru atvoldin til, at olja er farin á sjógv.

Royndirnar hesu seinnu árini vísa, at mest vanliga orsøkin til oljudálking er vantandi eftiransni í sambandi við bunkring av skipum og bátum. Oljudálkingar eru tó eisini komnar fyri orsaka av vantandi viðlíkahaldi, tað at skip sigla á land og sker og gáloysni í sambandi við raksturin umborð, at ventilar standa í skeivari støðu, tá pumpað verður o.s.fr.

Heimildin at revsa ólógliga oljudálking er ásett í § 44 í lógini. Í serligu viðmerkingunum til § 44 eru ásettar vegleiðandi bótastøddir fyri brot á § 7. Síðani lógin um verju av havumhvørvinum kom í gildi í maimánaða í 2005 hava hesar vegleiðandi bótaupphæddir verið ásettar í serligu viðmerkingunum til revsiásetingina í § 44 í lógini:

“Eftir stk. 2 kunnu bøtur fyri ólógliga burturbeining av olju herðast alt eftir, hvussu nógv olja verður burturbeind ólógliga. Bótastøddin eigur at ásetast við støði í, hvussu nógv olja verður latin út og lutfalsligu árinini á umhvørvið. Sum vegleiðing fyri áseting av bótastødd verður mælt til, at ein ólóglig burturbeining upp á umleið 500 litrar eigur at geva eina bót upp á umleið 25.000 krónur, ein ólóglig burturbeining upp á umleið 1000 litrar eigur at geva eina bót upp á umleið 50.000 krónur, og fyri burturbeiningar upp á umleið 10.000 litrar eigur bótin at setast til umleið 100.000 krónur. Bótastøddirnar eiga sjálvsagt at kunna hækka og lækka í førum, har tað eru antin herðandi ella linnandi umstøður.”

Vegleiðandi bótastøddirnar vórðu ásettar nøkulunda ájavnt teimum bótastøddum, sum grannalondini gjørdu brúk av, tá lógin varð samtykt. Fleiri grannalond hava síðani hert sínar revsireglur og hækkað bótastøddirnar, og m.a. tí verður eisini hildið rætt at herða bótastøddirnar her heima.

Í staðin fyri omanfyri nevndu vegleiðandi bótastøddir verður við hesum lógaruppskoti ásettar nýggjar og herdar vegleiðandi bótastøddir:

Vegleiðandi bótastøddirnar fyri ólógliga burturbeining av olju eftir § 7 í lógini verða herdar, soleiðis at ein ólóglig burturbeining av olju upp á 50 litrar eigur at viðføra eina revsing, har bótin verður ásett til umleið 25.000 krónur. Fyri ólógliga burturbeining undir 50 litrar, verður bótin ásett lutfalsliga við støði í bótini fyri burturbeining av 50 litrum. Ein ólóglig burturbeining av olju upp til 500 litrar eigur at viðføra eina revsing, har bótin verður ásett til umleið 150.000 krónur; ein ólóglig burturbeining av olju upp til 1000 litrar eigur at viðføra eina revsing, har bótin verður ásett til umleið 250.000 krónur. Ólógligar burturbeiningar av olju, har fleiri enn 1000 litrar eru farnar á sjógv, eiga at viðføra eina lutfalsliga størri revsing, har bótastøddin verður lutfalsliga hækkað við støði í bótastøddini fyri ólógliga burturbeining av upp til 1000 litrar av olju.

Siðvenjan higartil hevur verið, at myndugleikarnar grundað sína meting av, hvussu nógv olja er farin á sjógv, á varsemisregluna. Verður mett, at umleið 4-800 litrar eru farnir á sjógv, so er vanligt at áseta bót fyri 400 litrar og ikki 800 litrar. Orsøkin er, at tað skulu vera haldgóð prógv fyri metingini. Slíkar metingar skulu vera so haldfastar, at tær eisini kunnu leggjast til grund, um málið endar í rættinum. Í roynd og veru er onki ítøkiligt lágmárk ásett fyri, hvussu lítil oljudálkingin kann vera, áðrenn oljudálkarin kemur undir revsiábyrgd eftir lógini. Fortreytin er tó altíð, at nøgdin av olju, sum er farin á sjógv, skal kunna mátast ella metast við ávísari vissu, fyri at lógarbrotið kann sigast at hava neyðugan neyv- og fastleika, sum krevst fyri at áleggja revsing. Er útlátið heilt lítið, t.d. nakrir fáir desilitrar ella fáir litrar, verður bótastøddin eisini lítil. Enn hevur tó ongin siðvenja tikið seg upp at revsa bátaeigarar fyri so lítlar oljudálkingar.

**Til § 1, nr. 2**
Broytingin av § 46 ger tað møguligt at avgreiða brot á fráboðanarskylduna, sum er ásett í § 26 í lógini, við fyrisitingarligum sektaruppskoti.

Sambært § 26 í løgtingslógini um verju av havumhvørvinum skulu eigarar og brúkarar av skipum og havstøðum, eins og skiparar og loðsar boða MRCC Tórshavn frá ólógligari

burturbeining av olju og øðrum dálkandi evnum í havið. Eisini hava nevndu persónar eins og flogskiparar, havnamyndugleikar og fólk á landi skyldu til at boða MRCC Tórshavn frá, um tey síggja olju ella onnur skaðilig evni á sjónum.

Fráboðanarskyldan er grundað á verju av havumhvørvinum. Jú skjótari fráboðanin verður latin rætta myndugleikanum, tess skjótari og betur ber til hjá málsføru myndugleikunum at seta neyðug verju- og basingartiltøk í verk fyri at minka um skaðiligu avleiðingarnar á náttúru- og umhvørvistilfeingið frá dálkingini. At boða frá oljudálking á sjónum, at burturkast er tveitt fyri borð, ella blaka á sjógv av landi ella at onnur skaðilig evni síggjast á sjónum, er fyrsta týðandi stigið í strembanini at fyribyrgja spjaðing og at basa dálkingini.

Fráboðanarskyldan áliggur serliga dálkaranum sjálvum, tí dálkarin í flestu førum eigur at vera hin fyrsti, sum gerst varugur við dálkingina. Fráboðanin skal gerast skrivliga ella munnliga við at lata MRCC Tórshavn boðini um dálking. Vantandi fráboðan er lógarbrot, sum heimild er at revsa eftir lógini. Í kunngerð nr. 30 frá 8. mars 2001 um at senda inn fráboðan sambært havumhvørvislógini, við seinni broytingum, eru útgreinaðar reglur um fráboðan sambært § 26 í lógini. Kunngerðin er sett í gildi við heimild í kongaligu fyriskipanini, sum var í gildi áðrenn galdandi lóg varð sett í gildi.

Eftirsum tað í sjálvum sær ber til at staðfesta, hvørt fráboðanarskyldan er lokin ella ikki, verður við hesum lógaruppskoti skotið upp at heimila, at revsingin fyri brot á fráboðanarskylduna kann avgreiðast við fyrisitingarligum sektaruppskoti, eins og heimild er at avgreiða revsimál um oljudálking við fyrisitingarligum sektaruppskoti. Í roynd og veru er tað serliga vantandi fráboðan frá dálkaranum sjálvum, sum mangan er atvoldin til, at oljudálking á sjónum ótarnað sleppur at spjaða seg, og harvið gera størri skaða enn um basingarátakið kundi byrja fyrr. Hetta er ein umhvørvistrupulleiki, sum ikki kann góðtakast og tí eigur revsingin fyri vantandi fráboðan at verða útint skjótt og ikki seinni enn sjálv revsingini fyri oljudálkingina í førum, har dálkarin ikki hevur hildið fráboðanarskylduna.

Við at geva málsføra fyrisitingarmyndugleikanum heimild at seta fram fyrisitingarligt sektaruppskot fyri vantandi fráboðan verður mett, at slík mál frameftir verða avgreidd samstundis sum mál um revsing fyri sjálva oljudálkingina. Henda broyting staðfestir eisini tað eyðsýniliga, at passivitetur ella óvirkni í sambandi við at fráboða oljudálking, kanska elvt av illvilja frá dálkaranum um at geva seg til kennar, er at rokna sum herðandi umstøður í almennu strembanini at skerja skaðiligu avleiðingarnar á okkara náttúru og umhvørvi frá oljudálkingum.

**Til § 2**
Vanlig áseting um gildiskomu.